# Stór KT-ráðstevna í Norðurlandahúsinum

KT-RÁÐSTEVNA
*Eydna Skaale*

Hósdagin og fríggjadagin 22. og 23. apríl verður stór KT-ráðstevna hildin í Norðurlandahúsinum. Ein líknandi stevna varð hildin í 2002 eisini. Tá vardi stevnan somuleiðis í tveir dagar við einum vinnudegi og einum privatdegi. Fyrireikararnir hava í ár valt at broyta stevnuna nakað. Hesuferð verða nevniliga tveir vinnudagar, har dentur verður lagdur á at skapa samband millum KT-fyritøkur og kundarnar, sum serliga eru privat og almenn virki.

Endamálið við stevnuni er at fáa føroysku KT-vinnuna meiri sjónliga og at skapa størri álit á hana. Ætlanin er, at føroysku KT-virkini skulu gerast natúrlig val, ístaðin fyri at útlendsk feløg altíð verða tikin framum.

Í Norðurlandahúsinum verða 18 básir við føroyskum framsýnarum, har høvi verður at síggja vørur og tænastur. Hósdagin verður pallborðsfundur og kjak um framtíðina, har ein av høvuðsspurningunum verður, hvørt KT-vinnan kann gerast ein av høvuðsvinnunum í Føroyum. Bjørt Samuelsen verður orðstýrari.

Fyrireikararnir hava eisini boðið miðnámsskúlanæmingum niðan til kunnandi fund um lestrarmøguleikar og avbjóðingar innan KT-vinnuna. Stórur áhugi er millum ungdómin um KT-vinnuna, men sum er, eru alt ov fá arbeiðspláss í Føroyum eftir lokna útbúgving. Hetta er sera harmiligt, tí fleiri føroyingar eru, sum hava góða KT útbúgving, men sum ikki fáa nýtt hana til nakað í Føroyum, siga fyrireikararnir.

Bæði hós- og fríggjadagin verða fyrilestrar hildnir í útvarpshøllini, tveir hvønn dagin. Fyrilestrahaldarar verða bæði føroyingar og útlendingar, sum hava drúgvar royndir innan vinnuna.

Kostnaður er 475 kr um dagin, íroknað morgunmat, kalt borð og luttøku á fyrilestrunum, sum eru tann dagin. Stevnan endar fríggjakvøldið við eini veitslu á Hotel Føroyum.



*Fyrireikararnir vóna, at føroyska KT-vinnan fer at verða meira sjónlig framyvir*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul. av útsynningi. Um náttna stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi. Skýggjað og ælaveður, seinni nakað av regni. Hitin um dagin millum 6 og 10 stig, um náttina 4 til 8 stig.




**Veðrið hósdagin:**
At byrja við hvassur vindur av landsynningi og suðri og nakað av regni. Út á dagin upp í skrið, í hvirlum upp í storm, av útsynningi og vestri við ælaveðri. Um náttina minkar hann vindin niður í gul til stívt andøvsgul. av vestri. Hitin millum 4 og 8 stig




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi. Ælaveður, tó onkrir sólglottar. Hitin millum 4 og 8 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi, sum veksur upp í andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og eystri. Skýggjað og regn av og á. Hitin millum 4 til 8 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷12 |
| Nuuk | ÷6 |
| Qaqortoq | – |
| Ammassalik | – |
| Saint John's | 4 |
| Halifax | 4 |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 10 |
| London | 14 |
| Tromsø | 1 |
| Bergen | 5 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 8 |
| Keypmannah. | 9 |
| Helsinki | 6 |
| Moskva | 6 |
| Berlin | 7 |
| Warzawa | 11 |
| Kiev | 10 |
| Bukarest | 9 |
| Paris | 12 |
| Madrid | 11 |
| Róm | 13 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 20 |
| Malta | 19 |
| Tunis | 17 |
| Beijing | 22 |
| New Dehli | 37 |
| Bangkok | – |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 21 |
| New York | 11 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 29 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst í Grønlandsfjørðinum fer í ein landnyrðing og útsynningsvindur við ælaveðri rekur inn yvir oyggjarnar.



Hósdagin fer eitt djúpt lágtrýst yvir Føroyum sunnaneftir og síðani verða fleiri lágtrýst kring Føroyar.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 12/04 kl. 06[00]– 13/04 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 8,2°
Minsti hiti máldur í apríl: ÷9,9° - Mesti hiti máldur í apríl: 18,3°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 3,0 mm – mált frá 12/04 kl. 06[00]–13/04 kl. 06[00]
Avfallið higartil í apríl: 21,1 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

8. apríl: Mánin næstur jørðini
12. apríl: Seinna kvarter
19. apríl: Tendring
24. apríl: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 14. apr | 03.50 | 16.16 | 02.50 | 15.16 | 03.05 | 15.31 | 05.50 | 18.16 | 06.50 | 19.16 | 02.05 | 14.31 | 01.05 | 13.31 | 04.05 | 16.31 | 05.05 | 17.31 | 03.35 | 16.01 | 04.50 | 17.16 |
| 15. apr | 04.39 | 17.02 | 03.39 | 16.02 | 03.54 | 16.17 | 06.39 | 19.02 | 07.39 | 20.02 | 02.54 | 15.17 | 01.54 | 14.17 | 04.54 | 17.17 | 05.54 | 18.17 | 04.24 | 16.47 | 05.39 | 18.02 |
| 16. apr | 05.22 | 17.44 | 04.22 | 16.44 | 04.37 | 16.59 | 07.22 | 19.44 | 08.22 | 20.44 | 03.37 | 15.59 | 02.37 | 14.59 | 05.37 | 17.59 | 06.37 | 18.59 | 05.07 | 17.29 | 06.22 | 18.44 |
| 17. apr | 06.04 | 18.25 | 05.04 | 17.25 | 05.19 | 17.40 | 08.04 | 20.25 | 09.04 | 21.25 | 04.19 | 16.40 | 03.19 | 15.40 | 06.19 | 18.40 | 07.19 | 19.40 | 05.49 | 18.10 | 07.04 | 19.25 |

5 707265 100036 >